# Málráðið

## Ársfrágreiðing 2019

# Innihald


**Innihald …………………………………………………………………… 2**

**Arbeiðssetningur …………………………………………………………… 3**

**Inngangur ………………………………………………………………… 4**

**Limir í Málráðnum ………………………………………………………… 5**

**Starvsnevnd ……………………………………………………………… 6**

**Starvsfólk og umsiting …………………………………………………… 6**

**Fundir í Málráðnum ………………………………………………………… 7**

**Samstarv ………………………………………………………………… 8**

**Kunning og ráðgeving …………………………………………………… 9**

**Dømi um nýggj orð ……………………………………………………… 10**

**Stavsetingarorðabókin …………………………………………………… 11**

**Málráðið í miðlunum ……………………………………………………… 11**

**Hendingar í 2019: V.U. Hammershaimb 200 ár ……………………………….. 11**

**Málslig ráð: *Hvussu skriva vit tøl?*…………………………………… 12**

# Arbeiðssetningur

Málráðið hevur sum endamál at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal savna og skráseta nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og skal vera til hjálpar at velja og evna til nýggj orð.

Málráðið gevur landsstovnum og almenninginum vegleiðing, ráð og upplýsing um føroyskt í talu og skrift. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

Eisini kunnu stovnar og einstaklingar venda sær til Málráðið við spurningum. Málráðið eigur at samstarva við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu eina føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildir. Almennir myndugleikar hava skyldu at fylgja ásetingunum í stavsetingarorðabókini.

Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.

# Inngangur

Í 2019 varð hátíðarhildið, at tað vóru liðin 200 ár síðan føðingardag V.U. Hammershaimbs. Málráðið skipaði saman við Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya fyri stórum tiltaki í Kongshøll og fyri kvøldsetu um kvøldið á Reinsarínum. Máltøkni var m.a. á skránni í Kongshøll, og Sjúrður Gullbein, málráðslimur, legði fram fyrstu royndirnar hjá verkætlanini *Ravni* at fáa føroyska talu til tekst. At menna føroyska máltøkni er avgerandi fyri føroyska málmenning og málrøkt, og tað er at fegnast um, at tað gongur væl við týdningarmiklu verkætlanini *Ravni*. Sandra Saxov Lamhauge og Iben Nyholm Debess frá verkætlanini luttóku eisini á málráðsfundi á heysti 2019 og greiddu Málráðnum frá verkætlanini.

Máltøkni var somuleiðis evni á norðurlendskum netverksfundi í Nuuk í Grønlandi í august 2020, har ymiskar norðurlendskar verkætlanir vóru lagdar fram. Ásannast má, at tað er sera týdningarmikið, at norðurlendingar samstarva og stuðla hvørjum øðrum í arbeiðinum við máltøkni, tí hetta er sera umfatandi og kostnaðarmikið arbeiði, sum krevur holla serfrøði.

Hugtakið 'førenskt' varð viðgjørt á málráðsfundi á vári 2019. Málsligi økismissurin til enskt er vaksandi, og vandi er fyri málskifti um ikki so langa tíð, um ikki okkurt munagott verður gjørt beinanvegin. Sera umráðandi er hesum viðvíkjandi at fáa undirvísingina í føroyskum sum annaðmál í fasta legu, soleiðis at tilflytarar so skjótt sum gjørligt megna at samskifta á føroyskum og harvið hava lættari við at virka og trívast í føroyska samfelagnum.

Arbeiðssetningur Málráðsins fevnir eisini um føroyskt teknmál, og á málráðsfundi á heysti 2019 greiddi Edny Poulsen, teknmálstulkur, málráðslimunum frá føroysku teknmálsskipanini. Eins og við føroyskum talu- og skriftmáli er málsligur økismissur eisini ein stór avbjóðing hjá føroyskum teknmáli, og serliga er tað amerikanskt teknmál, sum ávirkar.

Høvuðsuppgávan hjá Málráðnum er at røkja, menna og verja føroyska málið. Tað er ásett í lógini, at Málráðið skal geva út stavsetingarorðabók, sum skal løggildast, og stórur partur av arbeiðinum hjá Málráðnum er beinleiðis tongt at arbeiðinum við Stavsetingarorðabókini, sum væntandi kemur út í hesi setuni.

Hetta er sjeynda ársfrágreiðing hjá Málráðnum síðan stovnanina 1. januar 2013 og triðja ársfrágreiðing hjá sitandi Málráði. Ársfrágreiðingarnar eru at finna á heimasíðu okkara www.malrad.fo.

Sólvá Jónsdóttir, forkvinna

## LIMIR Í MÁLRÁÐNUM

Nýtt Málráð tók við 1. juli 2017, og setan gongur út 30. juni 2021. Limirnir í Málráðnum eru:



**Sólvá Jónsdóttir**, ráðgevi, Hósvík, forkvinna, vald eftir tilmæli frá Námi.



**Eivind Weyhe**, lektari emeritus, Tórshavn, næstformaður, valdur eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini.



**Marna Jacobsen**, ritstjóri, Sørvági, vald eftir tilmæli frá Føroya lærarafelag og Javnstøðunevndini.



**Anfinnur Johansen**, lektari, Hoyvík, valdur eftir tilmæli frá Navnanevndini



**Elin Henriksen**, lærari, Strondum, vald eftir tilmæli frá Móðurmálslærarafelagnum.



**Hanna Simonsen**, fulltrúi, Tórshavn, vald eftir tilmæli frá Kommunusamskipan Føroya.



**Randi Meitil**, studentaskúlalærari, Tórshavn, vald eftir tilmæli frá Málfelagnum.



**Bergljót av Skarði**, cand. mag., Tórshavn, vald eftir tilmæli frá Rithøvundafelagnum.



**Sólfinn Hansen**, cand. mag., Fuglafirði, valdur eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni.



**Jógvan D. Hansen**, cand. phil., Svínáum, valdur eftir tilmæli frá landsstýriskvinnuni.



**Sjúrður Gullbein**, cand. phil., Tórshavn, valdur eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.



**Høgni L. Højgaard**, næstformaður fyri Deyvafelag Føroya, valdur eftir tilmæli frá Deyvafelagi Føroya og Felagnum fyri hoyribrekað í Føroyum.

## STARVSNEVND

Starvsnevndin er mannað við hesum limum í Málráðnum: Sólvá Jónsdóttir, forkvinna, Eivind Weyhe, næstformaður, Anfinnur Johansen, Elin Henriksen og Hanna Simonsen.

## STARVSFÓLK

Á skrivstovuni hjá Málráðnum, Málstovuni, starvast:



Kristin Marjun Magnussen**,** málfr.,
Tlf: (+298) 31 23 97
T-postur: kristin@malrad.fo



Marius Staksberg, skrivari,
Tlf: (+298) 31 23 97
T-postur: marius@malrad.fo

Eftir 20 ár í starvi, fyrst sum skrivari í Føroysku málnevndini og síðan sum skrivari í Málráðnum, gavst Marius Staksberg sum skrivari 31. des. 2019.

## UMSITING

Málstovan er umsiting hjá Málráðnum og veitir fólki og stovnum málsliga vegleiðing. Nógvir fyrispurningar koma inn við telefon, og aðrir verða sendir við t-posti.

Málstovan er at hitta á tlf. 312397 ella við at senda t-post til: malrad@malrad.fo.

Adressan hjá Málráðnum er:  Málstovan, Handan Á 5, 100 Tórshavn.

# Fundir í Málráðnum

Í 2019 vóru tveir fundir í Málráðnum. Í sambandi við arbeiðið við Stavsetingarorðabókini varð støða tikin til ymisk mál viðvíkjandi stavsetingarreglunum.

Í føroyskum orðabókum er *lámur* vanliga bert við sum navnorð, men tað verður næstan bara brúkt sum lýsingarorð. Á Málráðsfundi varð samtykt, at *lámur* eisini verður góðtikið sum lýsingarorð, og harvið eisini verður við í stavsetingarorðabókini sum lýsingarorð. Avgerðin ber í sær, at nú ber til at skriva *hon er lám*.

Í sambandi við staðarhjáorð sum *aftarlaga* og *aftarliga* eru orðabøkur ymsar á máli um, hvørt tað skal bera til at skriva báði við eftirskoytinum *-laga* og *-liga*. Í *Føroyskari orðabók* eru tólv staðarhjáorð við *-laga*, men trý teirra hava eisini frábrigdi við *-liga*, t.d. *aftarlaga* og *aftarliga*. Samtykt varð, at øll tólv staðarhjáorðini við *-laga* skulu kunna verða skrivað við *-liga* í stavsetingarorðabókini.

Tríggjar kunnandi framløgur vóru á málsráðsfundunum í 2019.

Hjalmar P. Petersen greiddi frá førenskum. Sbrt. Hjalmari byrjaði ávirkanin frá donskum á føroyskt av álvara um 1850, men hon hendi líðandi, og tað var serliga orðatilfeingið, ið var ávirkað – í minni mun málskipanin. Vit høvdu eina stabila tvímálsstøðu millum danskt og føroyskt. Ávirkanin frá enskum byrjaði av álvara, tá ið sjónvarpið kom í 1986, og hon er seinni økt við internetinum. Ein ábending um, at ávirkanin frá enskum er intensari enn hon nakrantíð var frá donskum, er koduskifti, sum bendir á, at málbrúkararnir halda seg duga enskt eins væl og føroyskt. Eitt málskifti frá føroyskum til enskt er sbrt. Hjalmari ikki óhugsandi, t.e. til eitt enskt, sum er nógv ávirkað av føroyskum framburði. Tað vaksandi talið av útlendingum í Føroyum, sum klára seg við enskum, men sum ikki duga føroyskt, økir um sannlíkindini fyri málskifti til enskt.

Í kjakinum eftir framløguna varð víst á, at neyðugt er at bøta um frálæruna í føroyskum fyri útlendingar, og at hon verður skipað betur. Eisini verður neyðugt, at meiri peningur verður játtaður til máltøkni. Fyri at vissa okkum, at føroyskt skal yvirliva, verður neyðugt við einum yvirskipaðum málpolitikki. Ein uppgáva hjá Málráðnum verður so at sannføra politikarar og onnur, sum taka avgerðir, at føroyskt kann vera í vanda sum livandi mál.

Á seinni fundi hevði Edny Poulsen, deyvatulkur, framløgu og kunning um føroyskt teknmál. Serliga snúði framløgan seg um evnini samskifti, samfelagsáskoðan og hugburður til teknmál, og hvussu teknmálið í høvuðsheitum er skipað.

Teknmál, sum føroysk deyv brúka, hevur nógv serføroysk tekn í sær. Sera nógv útlendskt árin er á føroyska teknmálið á okkara døgum. Serliga verður teknmálið yvirfloymt við amerikanskum teknum, sum bróta serliga nógv frá teimum europeisku teknunum, sum tað føroyska teknmálið er grundað á.

Spurningurin er, at hóast vit í løtuni hava føroyskt teknmál, hvat hendir við tí? Føroyskt deyvamál er viðurkent føroyskt mál. Men higartil hevur eingin kannað føroyskt deyvamál. Føroyskt deyvamál fær onga røkt, og ímeðan vita vit, at stórar broytingar fara fram.

Sandra Saxov Lamhauge og Iben Nyholm Debess frá verkætlanini *Ravni* høvdu framløgu um føroyska talukennaran, sum grunnurin *Teldutala* stendur fyri. Verkætlanarleiðari er Peter Juel Henrichsen. Høvuðsuppgávan hjá *Ravni* er at menna ein BLARK, sum umfatar ljóðupptøkur, lesitilfar, orðabók o.a.m. Framløgan snúði seg sum heild um arbeiðið við hesum BLARK'i. Royndirnar uttanlands við slíkum arbeiði og tilfari, har tilfarið ikki er frítt atkomiligt, hava gjørt, at føroyski verkætlanarbólkurin hevur gjørt av, at í Føroyum verður ikki kappast um tilfarið, men at øll skulu hava atgongd. Skal tilfarið brúkast til nakað ávíst, so má tað tillagast. BLARK'urin skal vera frítt atkomiligur og fríur fyri øll at brúka og menna til sín tørv. Aðrastaðni í heiminum sita fólk í hvør sínum lagi og verja sítt og seta prís á. Hetta ger mennandi arbeiðið dýrt. Í verkætlanini *Ravni* verður arbeitt deskriptivt og ikki normativt, og arbeitt verður eisini fram ímóti at hava eitt amboð.

## Samstarv

Málráðið er í dagligum samstarvi við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya. Málráðið hevur atgongd til innsavnað tilfar á søvnunum á Føroyamálsdeildini.

Haraftrat samstarvar Málráðið við málnevndirnar í hinum Norðurlondunum og er í sambandi við tær, tá tað eru viðkomandi mál á skránni hjá okkum. Netverkið fyri norðurlendskt samstarv samskipar samstarvið millum málráðini.

# Kunning og ráðgeving

## Spurningar til Málstovuna




25% av spurningunum vóru um stavseting, 11% vóru um mállæru, 23% vóru um málbering, 32% vóru um týðingar í føroyskt og 9% vóru spurningar um annað.




59% av spurningunum um týðingar til føroyskt vóru úr donskum, 34% vóru úr enskum og 7% úr øðrum málum, eitt nú týskum og íslendskum.




Í 2019 vóru 61% av spurningunum telduspurningar; 39% av spurningunum vóru um telefon.

## Dømi um nýggj orð í 2019

Eitt úrslit av týðingum til føroyskt eru uppskot um føroysk avloysaraorð fyri tey útlendsku orðini. Her eru nøkur dømi um uppskot um nýggj orð í 2019:

| | |
|---|---|
| **siðkyn** *h* | en. *gender* |
| **stakorðamyndan** *kv* | en. *univerbation* |
| **talgildisbúgving** *kv* | da. *digital dannelse* |
| **vørunýmenning** *kv* | da. *produktinnovation* (en. *product innovation*) |
| **tænastunýmenning** *kv* | da. *serviceinnovation* (en. *service innovation*) |
| **prosessnýmenning** *kv* | da. *procesinnovation* (en. *process innovation*) |
| **seryrkisligur** *lýs* | da. *fagprofessionel* |
| **fareind** *kv* | en. *mobile device* |
| **jarðtinna** *kv* | da. *geode* |
| **bygningsskjól**, **veðurskjól** *h* | da. *klimaskærm* |
| **støkkingarmark** *h* | en. *tipping point* |

Fullfíggjaður listi er at síggja á heimasíðuni hjá Málráðnum, http://malrad.fo/page.php?Id=57&l=fo

### Stavsetingarorðabókin

Fylgibólkur er settur at fylgja og vera partur av arbeiðinum við *Stavsetingarorðabókini*. Málráðið valdi tveir málráðslimir at manna fylgibólkin: Eivind Weyhe og Elina Henriksen. Við játtan frá Orðabókagrunninum ber til at halda fundir við regluligum millumbilum. Í 2019 hevur fylgibólkurin havt 32 fundir, har uml. 50.000 leitorð eru viðgjørd av teimum fyrstu 60.000 leitorðunum úr *Móðurmálsorðabókini*. Viðgjørda tilfarið frá fylgibólkinum verður rættað í orðabókaskipanini RiSt og fer síðan til rættlestur.

Í arbeiðinum við stavsetingarorðabókini koma málsligar tvístøður til sjóndar. Tí er neyðugt so hvørt at leggja mál frá fylgibólkinum fyri starvsnevndina til støðutakan. Er talan um grundleggjandi broytingar, kann starvsnevndin leggja málið fyri Málráðið til endaliga at taka støðu. Nøkur mál av hesum slag eru viðgjørd báði í starvsnevndini og í Málráðnum.

## Málráðið í miðlunum

### Ársins orð 2019

Við tveimum atkvøðum móti einari varð *heimafriður* valt sum ársins orð fyri 2019. Hetta hendi í útvarpsstovuni í sendingini *Góðan morgun, Føroyar*.

Hetta er fjórða árið á rað, at Morgunsendingin valdi ársins orð. Í 2016 var ársins orð *hjúnabandslóg*, í 2017 var tað *fiskivinnunýskipan* og í 2018 *ræstkjøtaburgari*.
At hjálpa morgunsendingini hesa ferð at velja ársins orð vóru Sólvá Jónsdóttir, forkvinna í Málráðnum, Jón Brian Hvidtfeldt, formaður í Felagnum fyri Føroysk Miðlafólk, og Anna Sofía Lava frá felagnum Samfelag, sum er felagið fyri føroyskar samfelagsfrøðingar.

## Hendingar í 2019

### V.U. Hammershaimb 200 ár

Saman við Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya varð skipað fyri tveimum tiltøkum hin 25. mars. At minnast V.U. Hammershaimb á 200 ára degnum verður dagurin hildin við fyrilestrum fyrrapart og seinnapart í Kongshøll á Vestaru Bryggju og við kvøldsetu á Reinsarínum.

# Málslig ráð

## Hvussu skriva vit tøl?

Í føroyskum hava vit tvinni talheiti, tey eldru/norrønu: tríati, fjøruti, fimmti, seksti, sjeyti, áttati og níti, og tey yngru: tretivu, hálvtrýssinstjúgu ella hálvtrýss, trýssinstjúgu ella trýss, hálvfjerðsinstjúgu ella hálvfjerðs, fýrsinstjúgu ella fýrs, hálvfemsinstjúgu ella hálvfems.

### Tøl undir hundrað verða skrivað í einum orði

20 - tjúgu
23 - tjúgutrý ella trýogtjúgu
38 - tríatiátta ella áttaogtretivu
40 - fjøruti
50 - fimmti, hálvtrýss ella hálvtrýssinstjúgu
60 - seksti, trýss ella trýssinstjúgu
70 - sjeyti, hálvfjerðs ella hálvfjerðsinstjúgu
80 - áttati, fýrs ella fýrsinstjúgu
90 - níti, hálvfems ella hálvfemsinstjúgu

### Tøl yvir hundrað verða ikki skrivað í einum orði

245 - tvey hundrað og fjørutifimm ella tvey hundrað og fimmogfjøruti

### Tal á túsundarum verður markað antin við millumrúmi ella punktumi

**3 406 ella 3.406** **-** trý túsund fýra hundrað og seks

**487 962 ella 487.962** **-** fýra hundrað og áttatisjey túsund níggju hundrað og sekstitvey ella fýra hundrað og sjeyogfýrs túsund níggju hundrað og tveyogtrýss

**808.741.227 ella 808 741 227-** átta hundrað og átta milliónir sjey hundrað og fjørutieitt túsund tvey hundrað og tjúgusjey ella átta hundrað og átta milliónir sjey hundrað og einogfjøruti túsund tvey hundrað og sjeyogtjúgu

### Millum heilt tal og desimaltal verður sett komma

**2,45** **-** tvey komma fýra fimm

## Støðubundna talskipanin
á túsundapartsplássinum, ein túsundapartur, túsundapartar
á hundraðpartsplássinum, ein hundraðpartur, hundraðpartar
á tíggjundapartsplássinum, ein tíggjundapartur, tíggjundapartar
á eittaraplássinum, ein eittari, eittarar
á tíggjaraplássinum, ein tíggjari, tíggjarar
á hundraðraplássinum, ein hundraðri, hundraðrar
á túsundaraplássinum, ein túsundari, túsundarar

## Terningakast
eittari, tveyari, tríari, fýrari, fimmari, seksari

## Spælikort
eini eittu(r), tveyu(r), tríu(r), fýru(r), fimmu(r), seksu(r), sjeyu(r), áttu(r), níggju(r), tíggju(r)

## Brot
eitt hálvt
ein triðingur
ein fjórðingur
ein fimtingur ella ein fimtapartur
ein sættingur ella ein sættapartur
ein sjeyndingur ella ein sjeyndapartur
ein áttingur ella ein áttandapartur
ein níggjundapartur
ein tíggjundapartur
ein hundraðpartur
ein túsundapartur
ein tíggjutúsundapartur

# Roknskapur fyri 2019

**Inntøkur**

| | |
|---|---|
| Játtan | 1.202.000 |
| Munur | 18.261 |
| | **1.183.739** |

**Útreiðslur**

| | |
|---|---|
| Lønir v.m. | 1.116.664 |
| Keyp av vørum og tænastum | 16.790 |
| Keyp av útbúnaði | 1.013 |
| Leiga | 49.272 |
| | **1.183.739** |